**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
**Kristin Michelsen**
**Sonja Jógvansdóttir**
**Ruth Vang**
**Ingolf Sólheim Olsen**
**Edmund Joensen**
**Magnus Rasnussen**
**Løgtingsmenn**

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 49/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um skrokknummar úr akfarsskránni)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu
(Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um skrokknummar úr akfarsskránni)

### § 1

Í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 6. juni 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 11 a verður sett:

*"Atgongd til skrásettar stakupplýsingar*

**§ 11 b.** Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um skrokknummar á akførum kann latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til kommunalar tilbúgvingar í Føroyum, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur.
*Stk. 2.* Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar, sum verða latnar eftir stk. 1, herundir at lata upplýsingarnar umvegis góðkenda skipan."

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar**
Uppskotið hevur stóran týdning fyri kommunalu tilbúgvingina í Føroyum, um tað verður møguligt hjá sløkkiliðsfólki at fáa atgongd til stakupplýsingar um skrokknummar á akførum, sum hava verið fyri óhappi, treytað av, at akførini frammanundan eru eyðmerkt við nummarspjaldri ella skrokknummari.

Sløkkiliðsfólk kunnu fáa allar tekniskar upplýsingar um akførini, tekningar v.m. á einari "app". Hetta ger bjargingararbeiðið tryggari og léttari.

Skulu sløkkiliðsfólk inn í ein bil, sum hevur verið fyri óhappi, at bjarga fólkum, er tað sera týðandi, at sløkkiliðsfólk hava upplýsingar um tann ávísa bilin, so tey kunnu sløkkja fyri "airbag" og vita, hvar tey skulu klippa í skrokkin á bilinum v.m., um tað er neyðugt.

Um fleiri el-bilar koma á vegirnar, verða avbjóðingarnar enn størri hjá sløkkiliðsfólk, tí tað er vandamikið at klippa í ein el-bil, um ein ikki veit, hvar tað skal gerast.

Lógin skal heimila, at kommunala tilbúgvingin í Føroyum skal fáa atgongd til skrokknummar á akførum. Harvið er ikki talan um beinleiðis persónupplýsingar.

Hetta fer at gera uppgávuna hjá sløkkiliðsfólki skjótari, léttari og tryggari, tá tey eru úti til vanlukkur.

**Serligar viðmerkingar**
**Til § 1**
Stk. 1. Í hesi áseting verður ásett, at tilbúgvingin í Føroyum skal fáa atgongd til stakupplýsingar um skrokknummar á akførum úr akfarsskránni hjá Akstovuni. Ætlanin er, at sløkkiliðsfólk, sum eru undir teimum kommunalu tilbúgvingunum, skulu fáa atgongd til stakupplýsingar um skrokknummar á bilinum, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur. Talan er bert um víðarilatan av skrokknummari, og ikki upplýsingar um eigara ella brúkara av akførum.
Ætlanin er, at upplýsingarnar bert skulu fáast til vega og nýtast í sambandi við vanlukkur líknandi støður.

Stk. 2 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri treytir fyri at fáa atgongd til hesar upplýsingar, umframt at lata hesar upplýsingar umvegis góðkenda skipan. Í hesum føri merkir tað, at ætlanin er, at stakupplýsingarnar um skrokknummar verða latnar umvegis eina app, sum er framleidd í Hollandi, og sum sløkkiliðsfólk kunnu fáa atgongd til og nýta. Í app´ini ber til at heinta allar hentar neyðugar upplýsingar um akfør, so sum tekniskar upplýsingar og mynd av akførum, sum hava týdning fyri sløkkiliðsfólk, tá tey eru úti til vanlukkur.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

**Á Løgtingi, 24. oktober 2018**

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur Kristin Michelsen

Sonja Jógvansdóttir Ruth Vang

Ingolf Sólheim Olsen Edmund Joensen Magnus Rasnussen